

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 08 - 2012

# Royndur skipari - Oljan kann steðga fráflyting

Finna vit olju og gass á føroyska landgrunninum kann tað fáa alstóran týdning fyri føroyska samfelagið. Føroyar kunnu ikki einans liva av fiskivinnuni, og tí er tað náttúrligt, at vit brúka orku til at finna annað tilfeingi eisini sum eitt nú olju og gass. Hetta heldur tann royndi fiskiskiparin, Ingolf Rasmussen, sum 74 ára gamal nú um dagarnar fór aftur til sjós. Hesaferð við Sermilik 2 hjá Thor til Eysturgrønlands at gera botnkanningar fyri oljufeløg. Ingolf Rasmussen telist millum tey mongu her heima, ið óttast ta vaksandi fráflytingina. Hóast tølini síggja óhugalig út, so heldur hann kortini, at til ber at venda gongdini. M.a. kunnu komandi oljufund vera við til at steðga fráflytingini. Sjálvur ivast hann ikki í, at vit fyrr ella seinni fara at finna hetta nýggja tilfeingið, sum fer at gera Føroyar til eina oljutjóð. Tað skal so lítið til á føroyskum øki at gera stóran mun hjá einum so lítlum landi sum Føroyar. Og alt meðan Statoil borar á landgrunninum annan mánaðin á rað, stendur tann so hugagóði og dugnaligi skiparin á brúnni á Sermilik 2 har norðuri í Eysturgrønlandi. Hansara uppgáva hesaferð at tryggja, at franskir, japanskir og aðrir granskarar kunnu gera týðandi botnkanningar, sum aftur skulu slóða fyri oljuboringum um nøkur ár. Lesið eisini alla samrøðuna við Ingolf aðrastaðni á oljan.fo. Síggið eisini spennandi myndafrásøgnina.